# Við Másanum til Svínoyar...

Ein túrur við Másanum til Svínoyar kann vera einastandandi góður um summarið, men eisini tilsvarandi buldrutur, tá tað líður ímóti vetrinum

SVÍNOYARFERÐ

*Solby A. Eliasen*



*Hvørja ferð Másin kemur niður í móti aftur aldunum, brýtur uppum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Koma til Hvannasund henda kalda mikumorgunin. Tað er ikki so nógvur vindur, men tað er sera kalt. Við keiina liggur Másin, og skiparin, Mogens Højsted stendur og prátar við nakrar sundamenn, tá tað verður rópt út gjøgnum stýrhúsrútin, at klokkan er tíggju minuttir yvir níggju.

»Mogens, skalt tú ikki við?«

»Ajú, lat meg bara koma við«, sigur skiparin flennandi og kemur skundisliga umborð. Og so verður lagt frá.

- Tað verður ikki so galið í dag, sigur skiparin og fer upp í stýrhúsið.

Ikki eru nógv ferðafólk í dag. Um eini seks ella átta. Og so er ein veðrur við eisini. Tað er ikki loyvt at flyta livandi seyð millum oyggjarnar, og ein maður greiðir frá, at hetta er ein seyður, sum fjallmenninir ikki fingu til oynna dagin fyri, og at hann tí hevur staðið umborð á Másanum alla náttina. Nú skal hann so til Svínoyar.

Standa úti og eygleiða ta stórfingnu náttúruna. Ein bygd á eini aðrari oyggj kemur til sjóndar. Hvør man hon vera? Ein eldri maður sigur, at tað er Kirkja á Fugloynni. Tað er ikki frítt, at tað er pínligt at finna út av, hvussu illa tað er statt við heimstaðarlæruni.

## Sjógvurin øtlast

So hvørt, sum tað verður siglt longur, byrjar tað at rulla meira og meira. Fleiri ferðir tekur skiparin frá, meðan vit fara upp á eina høga aldu fyri og aðra eftir.

- Bíða nú, tað verður verri enn, sigur maðurin.

- Men verið bara rólig, skiparin siglir hóvliga, so tað verður ikki so ringt, leggur hann uggandi afturat.

Kann ikki lata vera við at hugsa um hann mundi lesa andlitsbráið hjá mær, tá hann segði hetta seinna.

Eftir at hava staðið í øllum hesum buldrinum eina løtu, har tað kennist, sum ein er í eini tuflu, sum bert verður tveitt aftur og fram millum aldurnar, byrjar ein so smátt við at venja seg við tað. Og tað verður lættari at standa.

Í stýrhúsinum situr skiparin, og ein maður stendur og hyggur út gjøgnum rútin.

Har frammi í bátinum stendur veðrurin, sum fær nógvar karmar. Hvørja ferð báturin kemur niður í móti aldunum aftur, skola sjógvar inn, men tað letur ikki til at gera kríatúrinum nakað. Hann stendur í sama lag. Ikki eina tí einastu ferð sær tað út til, at hann fer at detta.

Skiparin er prátingarsamur. Hann sigur millum annað, at Másin siglir alt ov seint. Tað tekur fimm korter at sigla inn á Víkina, meðan tað tekur trý inn á Eiði. Og so er veðrið sjálvandi avgerandi fyri siglingartíðina. Henda dagin mundi túrurin vara úti við hálvan annan tíma, tí neyðugt var at taka frá so ofta í teimum høgu aldunum undir Svínoyarlandinum.

Stutt áðrenn bygdina, byrjar at batna. Tað rullar ikki so illa meira, og áðrenn ein veit av, verður lagt at á Víkini í Svínoy.

Fleiri fólk eru komin oman til lendingina at taka ímóti Másanum. Ein maður sigur, at túrurin bleiv ikki so buldrutur sum væntað.

Tað kenst gott at hava fast undir fótum aftur. Og túrurin heimaftur um kvøldið, hann verður ikki hugsað um, fyrr enn til ta tíð.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Turid Mørkøre, Oslo, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

### Heystið er lúsa- og lopputíð

Støðugt færri rottu- og hestahalar í teim norsku skúlagørðunum bera boð um, at heystið er gamalt. Í Noregi er lúsin vorðin ein sonn landaplága, og heystið er hásesongin fyri hesum óboðnu, ópopuleru og blóðsúgvandi verunum. Við tað, at lúsin tolir flestu kemikaliir, verða saksarnir hvestir, og hárlongdin á teim norsku barnahøvdunum støðugt styttri um hesa tíðina.

Loppurnar eru meira populerar. Nærum hvør norskur skúli hevur egið hornorkestur, og hesi skipa á hvørjum vári og heysti fyri loppumarknað, har gamalt skrambul fyri onkur, fær nýggjan íblástur hjá onkrum øðrum. Peningurin, sum kemur inn, verður nýttur til at keypa nýggj ljóðfør fyri og til at fíggja ferðir og tónleikalærarum. Loppuinntøkurnar gera eisini, at limagjaldið fyri hornblásturin verður lægri (1000-1500 kr), samanborið við onnur frítíðarítriv.

Avvarðandi at børnunum standa fyri øllum arbeiðinum í samband við loppumarknaðin, og tað er ein sjálvfylgja, at bæði mammur, pápar og systkin luttaka. Ommur og abbar at hornblásandi børnum eru eisini við í arbeiðnum, men tey eru sjálvboðin. Norðmenn eru nevniliga vanir við tað teir kalla "dugnad". Teir hava til dømis "høstdugnad" og "vårdugnad" á skúlum og barnagørðum, har tey avvarðandi rudda upp, frisera runnar, mála, skifta sand í sandkassum osv.

Loppumarknaður verður vanliga hildin leygardag og sunnudag, og bæði fimleikarhøll, skúlagarður og skúlastovur eru í brúki. Innsavningin av loppum byrjar seinnapart fríggjadag, og tá koyra lastbilar runt og heinta sekkir av klæðum, innbúgv og annað, sum fólk seta uttanfyri dyrnar. Loppurnar verða síðan sorteraðar og koyrdar á ymiskar avdeilingar á skúlanum. Vanliga eru avdeilingar fyri klæðir, innbúgv, ítróttarútgerð, køksútgerð, bøkur og el-hentleikar. Fínari loppur verða seldar á aksjón, og tá kann stemningurin gerast rættuliga høgur. Á onkrum loppumarknaði ber eisini til at fáa skift summardekkini út við vetrardekk.

Í ár var eg fyrstu ferð við til at skipa fyri einum tílíkum loppumarknað, og eg má viðganga, at tað var ein sonn fragd. Allir fyrireikararnir, smáir og stórir, arbeiddu so sveittin lak til langt út kvøldið, og øll vóru í góðum lag. Størsta upplivilsið varð tó at lata dyrnar upp. Tá var sannur ruðuleiki. Fólk streymaðu inn, onkur kastaði seg yvir onkra gamla kommodu og gamlar cowboybuksur og hosur fuku um oyruni.

Í ár gav loppumarknaðurin 317.000 kr. í kassan hjá hornorkestrinum. Hetta var enn eitt nýtt met. Eisini fyri Frelsunnarherin, sum fekk 68 sekkir av klæðum og 7 sekkir av skóm.






Vit hava alt til húsini

-bæði til privat og vinnu

Tvis køkar, bað og garderobeskáp

Crawford hurðar til privat og vinnuligt

Gólv og annað byggitilfar

Blomberg Hvitvørur

Dyno Nobel spreingievni

pf Klement Petersen

600 Saltangará - Tlf. 417560 - Fax. 448460



Standby kostar

Veitst tú...

• At í allari síni livitíð brúkar stereo-anleggið 33% av elnýtsluni at "sova í"

• At sjónvarpið brúkar 50 % av elnýtsluni at "sova í"

• At video-tólið brúkar 90 % av elnýtsluni at "sova í"



SEV Sløkkið veggkontaktina!



Altíð væl nøgd í klæðum frá Shari



Kjóli 199,00 kr.



Sandalir 475,00 kr.

Sølustevnutilboð:
Fiskabuksur 99,- kr.
Troyggjur 99,- kr.
Skógvar 150,- kr.

Vælkomin inn á bás nr. 23

SHARI

Heiðavegur 30
FO-600 Saltangará
Tlf. 448398 / 218398